# Sáttmáli

**millum**

## Yrkisfelagið Miðnám

**og**

## Fíggjarmálaráðið

Galdandi til 1. oktober 2017

# Innihaldsyvirlit


1. kapittul, øki ..... 3

§1 Øki ..... 3

2. kapittul, setan, vanligar treytir ..... 3

§2 Setan ..... 3

§3 Vikarar og kvotasett ..... 3

§4 Setanarbræv ..... 3

§5 Farloyvi og eftirútbúgving ..... 4

§6 Eftirløn ..... 4

§7 Barnferð og ættleiðing ..... 4

§8 Sjúka ..... 5

§9 Uppsøgn ..... 5

§10 Eftirsitiløn ..... 5

§11 Frítíðarløn ..... 5

§12 Tænastuferðir ..... 5

§13 Flytisamsýning ..... 5

§14 Samstarvsráð ..... 6

§15 Serlig størv ..... 6

§16 Gerðarrættur ..... 6

3. kapittul, tímalærarar, vanligar treytir ..... 6

§17 Tímalærari A ..... 6

§18 Tímalærari B ..... 6

§19 Tímalærari C ..... 6

§20 Barnferð, ættleiðing og sjúka hjá tímalærara ..... 7

§21 Uppsøgn av tímalærara ..... 7

§22 Aðrar setanartreytir fyri tímalærara ..... 7

4. kapittul, løn og starvsaldur ..... 7

§23 Løn ..... 7

§24 Yvirtíð ..... 7

§25 Starvsaldur ..... 7

5. kapittul, arbeiðstíð v.m. ..... 8

§26 Arbeiðstíð ..... 8

§27 Tímabanki, yvirtið og avspáking ... 10
§28 Niðursett tímatal ... 10
§29 Persónligar akkordir, samsýningar v.m. ... 10
§30 Næmingatøl ... 13
§31 Undirvísingaramboð ... 13
6. Kapittul, samsýningar ... 13
§32 Samsýningargjøld fyri tímalønt arbeiði, YF1 - YF6 ... 13
§33 Nevndararbeiði ... 14
§34 Skemalegging ... 14
§35 Verkætlanir og uppgávur ... 14
§36 Sjálvlesandi, stakgreinalesandi [eg havi lagt afturat yvirskiftini, BM] ... 14
§37 Næmingar við øðrvísi pensum enn flokkurin/valbólkurin ... 15
§38 At býta bólkar og flokkar ... 15
§39 At rætta skrivligar próvtøkuuppgávur ... 15
§40 Starvsstovuskeið ... 15
§41 Uppgávunevndir ... 16
7. Kapittul, uppsøgn ... 16
§42 Seravtalur ... 16
§43 At siga sáttmálan upp ... 17
Uppískoyti A, løn ... 19
Uppískoyti B, limir í serligum størvum ... 21
Uppískoyti C, protokollat ... 21
Uppískoyti D ... 22
Uppískoyti E ... 24

# 1. kapittul, øki

## §1 Øki

Hesin sáttmáli fevnir um lærarar, sum eftir 1. aug. 2013 fara at undirvísa sbrt. løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012 um gymnasialar miðnámsútbúgvingar, tó ikki lærarar á tøknibreytini.

Sáttmálin fevnir eisini um lærarar sum framvegis undirvísa innan hesar útbúgvingar:
1) Studentaskúlaútbúgving (ST),
2) Hægri Fyrireikingarpróvtøku (HF),
3) Hægri handilspróvtøku (HH),
4) Hægri próvtøku innan fiskivinnu (HIF),
5) Yrkisútbúgvingarnar FHS, SIF,
6) Akademisk starvsfólk á Námi.
Sáttmálin er ikki galdandi fyri tænastumenn, tænastumenn, ið fáa bíðiløn og eftirløntar tænastumenn.

**Skiftisreglur:**
Meðan næmingar, sum byrjaðu fyri 1. august 2013 gera seg lidnan við útbúgvingina verður reglurnar um atbeiðstíð í gamla sáttmálanum galdandi við teirri fyritreyt, at løntímar eftir gomlu skipanini verða umroknaðir til ársverkstímar eftir lyklinum: 21,0 løntímar pr. viku svara til 1750 ársverkstímar, sum avtalað í ískoyti til protokollat 4, Ársverksskipan. Í skiftistíðini 1.08.2013 til 1.08.15 verður tískil umroknað soleiðis, at ein lt/v í gomlu skipanini svarar til 1750 : 21,0 = 83,3 klt í nýggju skipanini.

# 2. kapittul, setan, vanligar treytir

## §2 Setan

Kapittulin er um lærarar, ið lúka treytirnar fyri at undirvísa í breytaskipanini sbrt. § 17 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012.
**2.** Leyst lærarastarv og leysir tímar í breytaskipanini skulu lýsast alment.
**3.** Tá ið lærari, ið ikki hevur lokið námsfrøðiliga útbúgving, verður settur í fast starv, verður farið undir hesa útbúgving so skjótt til ber sambært ætlan hjá Mentamálaráðnum.
Miðast skal eftir at ástøðiliga- og verkliga námsfrøðiliga útbúgvingin verða byrjað í seinasta lagi innan tvey ár eftir setan.
4. Um so er, at starvið arbeiðsliga, umsitingarliga ella á annan hátt hevur eina tílíka serstøðu, at tað er ikki umfatað av teimum vanligu fortreytunum fyri niðanfyri ásettu lønum o.ø., kann seravtala verða gjørd partanna millum um viðbøtur og onnur viðurskifti.

## §3 Vikarar og kvotasett

Fyri at verða settur í starv sum vikarur ella kvotasettur krevst lokið kandidat- ella masterprógv sbrt. § 17 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012. Vikarur/kvotasettur verður settur við føstum tímatali í avmarkaða tíð, ella í staðin fyri lærara í føstum starvi. Vikarur/kvotasettur verður settur í mesta lagi í 12 mánaðir í senn. Løn, arbeiðstíð og treytir annars eru sum í hesum sáttmála, tó er grein 8 um barnferð bara galdandi í setanartíðini.

## §4 Setanarbræv

Í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fær lærari setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:
1) navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta
2) nær setanin tekur við
3) galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir
4) starvsheiti
5) byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti)
6) eftirlønargjald
7) starvsaldur og næsta broyting í starvsaldri
8) uppsagnartíð hjá arbeiðsgevara og setta

9) setanarbrotpartur, arbeiðstíð
10) frítíð við løn og frítíðarískoyti
11) setanarøki og
12) arbeiðsstaður/-staðir í løtuni (fevnir arbeiðið um fleiri skúlar, skal verða viðmerkt í hvørjum skúla lærarin hevur høvuðsstarv).

## §5 Farloyvi og eftirútbúgving

Lærari hevur rætt og skyldu at eftirútbúgva seg.
2. Lærara skal verða loyvt at fáa farloyvi uttan løn, stríðir tað ikki ímóti áhugamálum stovnsins. Tó skal lærari, ið hevur verið í starvi í 5 ár, so vítt gjørligt hava rætt til farloyvi.
3. Fær lærari farloyvi í sambandi við útbúgving, sum tænir áhugamálum stovnsins, kunnu partarnir koma ásamt um farloyvi við løn ella niðursettari løn við eftirlønargjaldi.
4. Lærari eigur í samráð við stovnin at hava møguleika at luttaka í styttri útbúgvingarskeiðum (um leið 1-7 dagar), og verða útreiðslurnar goldnar sambært §12.
5. Farloyvi verður givið í upp til 1 ár í senn og í mesta lagi í 4 ár, og er tað skylda stovnsins at skipa so fyri, at starv stendur læraranum opið, tá ið hann kemur aftur. Tá ið lærarari fer í annað fast starv verður farloyvi givið í mesta lagi 1 ár. Uttan so at serligar umstøður gera seg galdandi.
6. Fær lærari farloyvi í sambandi við gerð av undirvísingartilfari ella í sambandi við útbúgving, sum tænir áhugamálum stovnsins, verður farloyvið ikki innroknað í áramálið í 5. petti.
7. Fær lærari farloyvi at sita í bý- ella bygdaráði, á fólkatingi, í løgtingi, í landsstýri ella at vera løgmaður, verður farloyvið ikki innroknað í áramálið í 5. petti. 5
8. Felagið kann fáa farloyvi ella niðursett tímatal til lim í eitt undirvísingarár í senn við at boða leiðslu stovnsins frá, áðrenn fak- og tímabýtið fer fram á vári, og gjalda sín lutfalsliga part av lønini. Arbeiði fyri felagið gevur starvsaldur eins og vanlig undirvísing.
9. Umsókn um farloyvi skal verða latin leiðara útbúgvingarstovnsins í seinasta lagi tann 1. apríl.

## §6 Eftirløn

Eftirlønargjaldið er 15%. Starvsfólk, sum eru tímalønt, hava rætt til 15 % í eftirløn.
Stk. 2. Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið í góðkenda eftirlønarskipan sambært eftirlønarlógini.

## §7 Barnferð og ættleiðing

Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar at eiga.
Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði við løn í 24 vikur tilsamans at rokna frá tí, at starvskvinnan gerst óarbeiðsfør, tó í fyrsta lagi 8 vikur undan mettum barnsburði. Frá 14. viku eftir barnsburð kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, tá ið hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Ættleiðing*
Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp í 4 vikur áðrenn tey fáa barnið og í 24 vikur tilsamans.
Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín.
Rætturin til barsilsfarloyvi við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið.

*Farloyvi við ongari løn*
Herumframt hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur, soleiðis at skeiðini tilsamans fyri foreldrini eru upp í 52 vikur eftir føðing.
Stk. 2. “Við løn” merkir, at viðkomandi í barsilstíðarskeiðinum fær lønarbrøk 1, um viðkomandi arbeiðir fulla tíð (1750 tímar). Arbeiðir viðkomandi meira/minni hækkar/lækkar lønarbrøkurin lutfalsliga.

(Sí eisini lógina um barsilsskipan m.a. viðvíkjandi rætt til fráveru, starvsaldur og barsilspening).

## §8 Sjúka

Er lærari vegna sjúku ikki førur fyri at koma til arbeiðis, verður hetta roknað sum lógligt forfall. Er hann sjúkur longri enn 2 vikur, kann verða kravt, at arbeiðsgevarin fær at vita frá lækna um útlitini fyri arbeiðsførinum. Arbeiðsgevarin rindar læknaváttanina.

Stk. 2. Lærari kann fáa frí við løn, tá ið barn hansara er sjúkt, tó í mesta lagi 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar um árið. Eigur hann 2 ella fleiri børn undir 10 ár, kann hann fáa frí upp í 20 dagar í einum skúlaári.

Stk. 3. Er lærari burtur dagar, tí hann er sjúkur ella hevur annað lógligt forfall, telur ráðlagda arbeiðstíðin við í tímauppgerðini.

Hevur lærari lógligt forfall ella lógliga fráveru í longri tíð t.d. tvørtur um eitt skúlaársskifti kann hann ikki ráðleggjast við minni enn fullum ársverki (p.t. 1750 tímum) ella tí áður avtalaða ársverkinum í einum nýggjum skúlaári, og ráðlagda arbeiðstíðin telur við í tímauppgerðini.

Stk. 4. Er einki arbeiði lagt til rættis fyri fráverutíðarskeiðið, verða tímar roknaðir soleiðis í uppgerðina, at lærarin hvørki vinnur ella missur tímar orsakað av, at hann er sjúkur.

## §9 Uppsøgn

Viðvíkjandi uppsøgn verða reglurnar í løgtingslóg nr. 13 frá 20. mars 1958 um starvsmenn at galda.

2. Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið til ummælis við minst 14 daga freist. Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara fær ikki ætlanarskrivið, men fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum.

3. Uppsøgn, ið ikki er úrslit av einum gerðarrættarúrskurði, eigur at fylgja skúlaárinum.

4. Uppsagnarfreistin hjá álitisfólkum verður longd við 3 mánaðum.

## §10 Eftirsitiløn

Tá ið starvsfólk doyr í tænastutíðini, eiga hjúnafelagi/samlivari ella børn undir 21 ár, sum tað uppiheldur, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir. Eftirsitilønin er seinast útgoldna mánaðarlønin. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

## §11 Frítíðarløn

Lógin um frítíð við løn er galdandi.

Stk. 2. Lærari, sum heldur frí við løn, eigur rætt til serstakt frítíðargjald av útgoldnari fastari løn í innvinningarárinum frammanundan, p.t. 1,5%.

Stk. 3. Yvirtíðarløn sambært §25, sum verður útgoldin, verður goldin 11 mánaðir um árið, t.e. august til juni. Haraftrat verður útgoldið eitt frítíðargjald, sum er eitt fast prosenttal (p.t. 12 %) av tí, sum lærari innvinningarárið frammanundan hevur fingið út yvir ta føstu lønina, t.e. yvirtíð, samsýningar v.m.

Stk. 4. Frítíð og frídagar verða at leggja í samsvar við galdandi skúlafyriskipanir.

## §12 Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur á tænastuferð og útiviðbót er tað sama sum fyri tænastumenn landsins ella sambært serligari avtalu.

## §13 Flytisamsýning

Um lærari eftir áheitan frá stovninum verður settur í annað starv ella flytur høvuðsstarvsstað og í tí sambandi noyðist at flyta húski og húsbúnað, verða útreiðslurnar goldnar eftir rokning.

### §14 Samstarvsráð

Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita. Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrr enn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli. Settur verður fýramannabólkur við tveimum umboðum valdum av yrkisfeløgunum og tveimum valdum av Landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum.

### §15 Serlig størv

Størvini sum bókavørður, lestrarvegleiðari, telduvegleiðari, umsitingarleiðari og deildarleiðari ella líknandi verða lýst við innanhýsis uppslagi og verða sett millum føstu lærarar skúlans. Umsóknar-freistin er 3 vikur. Er eingin umsøkjari, tá ið umsóknarfreistin er farin fyri innanhýsislýsingini, kunnu hesi størv í samráð við Yrkisfelagið verða lýst leys alment sum partur av lærarastarvi. Ásetingin broytir ikki verandi praksis á handilsskúlanum.
2. Uppsøgn skal fara fram í seinasta lagi 1. mars at galda frá 1. august.

### §16 Gerðarrættur

Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

## 3. kapittul, tímalærarar, vanligar treytir

### §17 Tímalærari A

Tímalærari A er lærari, sum hevur í minsta lagi 3 ára akademiska útbúgving, men lýkur tó ikki krøvini í galdandi lóggávu. Verður settur í avmarkaða tíð í hvørjum skúlaári, tó í mesta lagi í 12 mánaðir frá 1. august. Tímalærari A verður løntur eftir BA-stiganum ella cand. phil-stiganum (talva 2) í mun til útbúgving, og lutfalsliga eftir tímatalinum. Starvsaldur verður roknaður eftir grein 26.
Fær tímalærari A seinni fullan undirvísingarførleika, verður hann framfluttur til á nærmasta hægri lønarstig (í kr.) á cand.mag. stiganum (talva 1). Lønaraldurin verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum við fyrru innplaseringina hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggju innplaseringini, fær longu frá hesum mundi nýggja aldursviðbót. Tímalærarar, ið starvast longri enn 3 mánaðir, fáa eftirlønargjald.

### §18 Tímalærari B

Tímalærari B er lærari, sum ikki hevur akademiska útbúgving. Hann verður settur í avmarkaða tíð í hvørjum skúlaári, tó í mesta lagi í 11 mánaðir frá 1. august.
Tímalærari B verður løntur eftir lønarstiginum Tímalærari B (Talva 3) lutfalsliga eftir tímatalinum.
Tímalærari B má í mesta lagi hava 1350 tímar, um ikki heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi. Farið kann bara verða út um 1350 tímar, um skúlamyndugleikarnir hava góðkent tað frammanundan.
Tímalærari B fær løn fyri tíðina, hann er settur og fær frítíðarløn eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. apríl 1986 við seinni broytingum.
Lýkur tímalærari B seinni treytirnar fyri at undirvísa í breytaskipanini sbrt. § 17 í løgtingslóg nr. 62 frá 15. mai 2012, verður avtala um starvsaldur gjørd í hvørjum einstøkum føri.
Tímalærarar, ið starvast longri enn 3 mánaðir, fáa eftirlønargjald.

### §19 Tímalærari C

Tímalærari C er akademikari á kandidatstigi, sum er í fullum starvi aðrastaðni og hevur tímar á útbúgvingunum nevndar í § 1 í hesum sáttmála aftrat sínum vanliga arbeiði. Tímalærari C fær løn sum tímalærari A á 8. stigi.
Lærari, sum er akademikari á kandidatstigi og sum ikki er í fullum starvi aðrastaðni og hevur tímar á

útbúgvingunum nevndar í § 1 í hesum sáttmála aftrat sínum vanliga arbeiði, er at rokna sum vikarur/kvotasettur smb. §3. Sí eisini § 6.

### §20 Barnferð, ættleiðing og sjúka hjá tímalærara

Tímalærari, sum er settur í styttri enn 3 mánaðir ella í minni enn hálvt starv, kemur undir javnstøðulógina og dagpeningalógina.
2. Er tímalærari settur longri enn 3 mánaðir og í hálvt starv ella meira, galda ásetingarnar í § 7 og 8.

### §21 Uppsøgn av tímalærara

Við ongari fráboðan er setanin hjá tímalærara av tann dagin, avtalað varð, tá ið lærarin varð settur í starv. Setanin kann verða longd, og verður tá roknað sum ikki slitin. Fyrsta hálva árið, tímalærari er í starvi, er uppsagnarfreistin ½ mánaður, eftir hetta 1 mánaður, eisini í seinni setanum eftir hesum sáttmála.

### §22 Aðrar setanartreytir fyri tímalærara

Fyri tímalærarar galda annars hesar ásetingar í 2. kapitli:
1) §4 um setanarbræv
2) §11 um frítíðarløn
3) §12 tænastuferðir
4) §14 um samstarvsráð
5) §16 um gerðarrætt

## 4. kapittul, løn og starvsaldur

### §23 Løn

Lønin hjá lærara, sum er settur sambært §2 verður ásett eftir lønaraldri sambært Uppískoyti A (lønartalvur) um løn.
2. Tær í 1. petti ásettu lønir eru treytaðar av, at lærari sambært grein 26 hevur fult ársverk (1750 tímar).
3.Lønin er sum ásett í lønartalvunum.
4. Lærari, ið er í øðrum starvi sum leiðari, deildarleiðari, fulltrúi ella líknandi, verður løntur eftir hesum sáttmála. Harafturat verður veitt viðbót eftir seravtalu partanna millum (sí §2, 4. petti) í hvørjum einstøkum føri.
5. Lærari við niðursettum tímatali fær løn lutfalsliga eftir tímatalinum.
6. Lønin verður goldin mánaðarliga afturút og í seinasta lagi síðsta dag í mánaðinum, sum peningastovnarnir hava opið.

### §24 Yvirtíð

Tá ið yvirtíð verður útgoldin, verður mánaðarliga gjaldið fyri yvirtíð roknað soleiðis: Hevur lærari átikið sær eitt ársverk á t.d. 2100 tímar er yvirtíðin (2100 – 1750) = 350 tímar. Mánaðarliga gjaldið verður tí (350/1750) = 20% av netto mánaðarlønini á tí stigi lærarin er á.

### §25 Starvsaldur

Starvsaldur verður vanliga roknaður eftir kandidatári, t.e. áramálið, sum viðkomandi eftir próvtøku hevur verið í arbeiði, sum krevur kandidatútbúgving. Skeið í pedagogikum gevur starvsaldur eins og vanlig undirvísing. Starvsaldurin verður roknaður frá fyrsta í tí mánaðinum, kandidaturin hevur lokið
prógv. Er síðsti partur av próvtøkuni ein skrivlig uppgáva, verður roknað eftir, nær váttan fyriliggur um, at uppgávan verður góðkend.

2. Hevur lærari í minsta lagi hálva tíð, fær hann fullan starvsaldur. Er talan um minni enn hálva tíð, verður starvsaldurin roknaður lutfalsliga í mun til fult ársverk (1750 tímar).
3. Tala viðurskiftini fyri tí, kunnu sáttmálapartarnir gera avtalu um starvsaldur eftir øðrum treytum.

# 5. kapittul, arbeiðstíð v.m.

## §26 Arbeiðstíð

**Virksemið** hjá lærara fevnir um

**1) UNDIRVÍSING**

**2) NÁMSFRØÐILIGAR OG UMSITINGARLIGAR UPPGÁVUR og**

**3) AÐRAR UPPGÁVUR**

Virksemið skal lýsast í eini *virksemisætlan* fyri hvønn lærara. Í framhaldi av árliga fak- og tímabýtinum fær hvør lærari fyri summarfrítíðina eina *forskotsætlan*, sum í samráði við leiðsluna skal gerast ein endalig virksemisætlan í seinasta lagi 15. sept. sama ár.
Árliga tímatalið hjá lærara verður alt tað ber til ráðlagt til 1750 ± 300 klokkutímar.

Virksemisætlanir verða gjørdar fyri tíðina frá 1. august til 31. juli árið eftir. Próvtøkuparturin, t.v.s. (tíðin til ársroyndir, próvtøkuvakt, próvtøkuhald og próvdøming) verður roknað soleiðis: Tað veruliga próvtøkutímatalið verður talt upp fyri skúlaárið. Tað próvtøkutímatalið verður flutt til virksemisætlanina eftirfylgjandi skúlaár og avroknað tá. Tað merkir, at um lærari gevst í sínum starvi við skúlaársenda, so má stovnurin gjalda viðkomandi lærara løn fyri próvtøkutímatalið, sum annars skuldi verið flutt til næsta skúlaár.

**Tíðarhugtøk** í ársverkinum eru:

**Útbúgvingartíð (ÚT):**
samlaða tíðin til útbúgvingina fyri hvørja lærugrein og fyri hvørt lærugreinastig, sum hon er ásett í kunngerð.
**Minkað útbúgvingartíð (100 – m)%ÚT(=mÚT):**
nettotíðin til útbúgving, tá innanhýsis royndir, felagstímar o.s.fr. er drigið frá. **m** er er eitt %-tal ásett av leiðara útbúgvingarstovnsins í mesta lagi 8%.
**Fyrireikingartíð (fÚT):**
tíðin at fyrireika og eftirmeta undirvísing (einsamallur ella í toymi).
**Næmingatíð (NT):**
tíðin ein næmingur nýtir til skrivlig avrik, sum hon er ásett í kunngerð fyri hvørja lærugrein og hvørt lærugreinastig
**Próvtøkutíð (PT):**
tíðin næmingur nýtir til munnliga próvtøku, sum hon er ásett í námsætlan fyri hvørja lærugrein og hvørt lærugreinastig
**Lærarapróvtøkutíð (LPT):**
tíðin, sum lærari/próvdómari fáa í ársverkið fyri at próvhoyra/próvdøma
**Eftirmetingartíð (eNT):**
tíðin, sum lærari fær í ársverkið í sambandi við eftirmeting av skrivligum avrikum
**Umsitingartíð (uÚT):**
tíðin, sum lærari fær í ársverkið fyri at skráseta fráveru, skriva støðumet, ársmet, elektroniskt samskifti o.l.
**Tíð til steðgir (sT):**
tíðin, sum lærari fær í ársverkið til steðgir (fríkorter) millum undirvísing
**Puljan (pL):**
Hetta er tíðin sum undirvísingarstovnurin setir av til annað virksemi (§19 í undirvísingarkunngerðini). Hendan tíðin fer í pulju, sum samlaði lærarahópurin brúkar til t.d. akkordir.

**Ad 1) UNDIRVÍSING:**
Samlaða tíðin til undirvísing, sum skal roknast við í ársverkið,er:

**Minkað undirvísingartíð + fyrireikingartíð:**

**(100 – m)% × ÚT + f × (100 – m)% × ÚT**

m er eitt tal ≤ 8.
f er fyrireikingarfaktorunin.

**Ad 2) NÁMSFRØÐILIGAR OG UMSITINGARLIGAR UPPGÁVUR:**
Samlaða tíðin til námsfrøðiligar og umsitingarligar uppgávur, sum skal roknast við í ársverkið, er:

**Rætting + próvdøming (frá árinum frammanundan) + umsiting:**

**e × NT + LPT + u × ÚT**

e er ein rættifaktorur. Útbúgvingartíðin til innanhýsis terminsroyndir skal í rættihøpi telja við í arbeiðstíðini á sama hátt sum nemingatíð. Tað vil siga, at um 25 nemingar sita til terminsroynd í 4 tímar verður veitt 0,1 x 4 x 25 = 10 tímar.

u er ein umsitingarfaktorur
lPT sí stk. "Munnlig próvtøka" í §30, stk. 12.

**Ad 3) AÐRAR UPPGÁVUR:**
Samlaða tíðin til aðrar uppgávur, sum skal roknast við í ársverkið, er:

**Tíðin til fríkorter + tíðin til persónligar akkordir**

**s × (100 – m)% × ÚT + pA**

s er ein fríkorterfaktor
pA er avtalað persónlig akkord

**Viðm.:** Nær steðgir, sum verða roknaðir við í ársverkið, skulu haldast, verður ásett av leiðsluni (tímatalvan), og í tílíkum steðgum eigur lærari vera tøkur. Ein partur av pA er tann parturin sum kemur frá pL.( sí omanfyri)

**SAMLAÐA ÁRSVERKIÐ** verður roknað soleiðis:

| | |
|---|---|
| (undirvísing) | **(100 – m)% × ÚT** |
| (fyrireiking) | **+ f × (100 – m)% ÚT** |
| (rætting) | **+ eNT** |
| (próvdøming frá árinum frammmanundan) | **+ LPT** |
| (umsiting) | **+ uÚT** |
| (fríkorter) | **+ s × (100 – m)% × ÚT** |
| (pers. akkordir) | + pA |

Har sum
**m ≤ 8**
**f = 133 % (1,33)**
**e = 10 % (0,10)**
**u = 11 % (0,11)**
**s = 22 % (0,22)**

**Aldursniðurskurður**
1. Árliga tímatalið hjá lærara við meira enn 22 ára starvsaldri innan undirvísingarvirksemi á miðnámsskúlastøði ella hægri er 1667.

2. Lærari, sum er fyltur 60 ár, og hevur 15 ára starvsaldur innan undirvísingarvirksemi á miðnámsskúlastøði ella hægri, fær afturat niðurskurðin í stk. 1, ein niðurskurð á 167 tímar. Starvast lærarin niðursetta tíð verður niðurskurðurin roknaður lutfalsliga.
3 Lærarar, sum koma undir regluna í stk. 2 kunnu ikki hava yvirtíð. Verða teir kortini ráðlagdir við fleiri tímum, skulu tímarnir setast í tímabanka og teljast við í ráðlagda tímatalið árið eftir.
4 Lærari ið velur ikki at fáa niðurskurð sambært stk. 2, kann hava yvirtíð.

## §27 Tímabanki, yvirtið og avspáking

Yvirtímar verða avroknaðir í lutfallinum 1 til 1.
**Stk. 2.** Yvirtíð í ársverkinum hjá einstøkum lærara upp til 300 t kann setast í tímabankan. Undirtímar í ársverkinum hjá einstøkum lærara verða, alt tað ber til, tiknir úr tímabankan og rindaðir aftur árið eftir.
**Stk. 3.** Yvirtímar sum ikki fara í timabankan verða útgoldnir so hvørt.
**Stk. 4.** Fer lærari úr starvi, verða yvirtímar útgoldnir, og undirtímar afturhildnir í lønini.

## §28 Niðursett tímatal

Lærari kann eftir umsókn fáa niðursett tímatal. Henda skipan kann vera tíðaravmarkað til 1 ella 2 ár ella kann vera varandi. Er skipanin tíðaravmarkað, hevur lærarin rætt til at venda aftur til fult tímatal. Nýggj avtala um niðursetta tíð kann eisini verða gjørd. Er skipanin varandi, og lærarin ynskir at økja tímatalið aftur, hevur hann framíhjárætt til leysar tímar.

## §29 Persónligar akkordir, samsýningar v.m.

Sentralar akkordir (sen) skulu avtalast í sáttmálanum. Lokalar akkordir (lok) skulu avtalast millum leiðslu og lærara, saman við álitisfólki.

**1. Bókavørður (sen):**
Partarnir eru samdir um, at royndarskipanin á bókasøvnunum, sum varð sett í gildi tann 1. januar 1988, heldur fram (sí protokollat dagfest tann 18. desember 1987).
Niðurskurðurin fyri bókasavnsarbeiði er: á Føroya Studentaskúla 1083 tímar,  Studentaskúlanum og HF-skeiðinum í Eysturoy 1000 tímar, á Miðnámsskúlanum í Suðuroy 417 tímar og á Klaksvíkar HF-skeiði 417 tímar, handilsskúlanum í Havn 333 tímar.
Partarnir eru samdir um at taka málið upp aftur, tá ið skúlarnir verða skipaðir í deplar.

**2. Lestrarvegleiðarar** (sen):
Starvið skal røkjast av lærara við royndum ella av hægri útbúnum lestrarvegleiðara.
Til hetta fær lestrarvegleiðarin:

**1. flokkur (og FHS) allar breytir uttan fyrireikingarbreytin:**
132 tímar  +  38 tímar frá lestrarmenningini = 170 tímar til lestrarvegleiðing
**1. flokkur fyrireikingarbreytin:**
122 tím  +  53 tímar frá lestrarmenningi = 175 tímar til lestrarvegleiðing
**2. flokkur allar breytir uttan fyrireikingarbreytin ( og 1. HH og 2.rx til hesir eru farnir úr skipanini):**
85 tímar til lestrarvegleiðing
**2. flokkur fyrireikingarbreytin:**
150 tímar til lestrarvegleiðing
**3. flokkur (og 2. HH og 3.rx til hesir eru farnir úr skipanini):**
110 tímar til lestrarvegleiðing

**3. Net- og telduumsiting (lok):**

Leiðslan ásetur tørvin og lýsir starvið. Starvið kann setast av net-/teldukønum fólki ella av skikkaðum lærara. Tíðarnýtslan verður avtalað lokalt, um lærari røkir starvi.

**4. Álitisfólk:**
Álitisfólkið skal hava møguleika fyri at taka sær av málum, ið viðvíkja starvsfeløgunum ella arbeiðsviðurskiftunum á staðnum, tó soleiðis, at tað stendst so lítið tarn av hesum sum møguligt. Tímarnir brúktir til hetta verða roknaðir við í uppgerðina. (Sí uppískoyti D – Reglugerð fyri álitisfólk)

**5. Kvøldundirvísing:** 1 skematími eftir kl.17.00 verður roknaður sum 1,2 tími.

**6. Savnsumsjón:**

| Lesandi, sum hava lærugreinina | Alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði | Tónleikur, myndlist og dekoratión |
|---|---|---|
| Upp til 100 | 45 tímar | 30 tímar |
| 101 – 200 | 80 tímar | 60 tímar |
| 201 – 300 | 115 tímar | 90 tímar |
| 301 – 400 | 150 tímar | 110 tímar |
| 401 – 500 | 190 tímar | 130 tímar |
| 501 – 600 | 225 tímar | 150 tímar |
| 601 – 700 | 260 tímar | 170 tímar |
| 701 – 800 | 295 tímar | 190 tímar |
| Yvir 800 | 330 tímar | 210 tímar |
| | Geografi, ítróttur, miðlakunnleiki og leiklist | |
| Upp til 50 | 30 tímar | |
| 51 – 100 | 45 tímar | |
| Yvir 100 | 60 tímar | |

**7. Lærararáðsnevndin (sen):**
Nevndin fær 167 tímar.

**8. Ferðing(sen):**

Tá ið lærari verður álagdur at ferðast ímillum ymisk undirvísingarpláss, verður ferðatíðin ásett sambært galdandi ferðaætlan ella mett sambært vegalongdir hjá Landsverki. Ferðatíðin verður gjørd upp fyri skúlaárið og tald við í ársverkið. Vanligu reglurnar fyri tænastuferðir er eisini galdandi.

**9. Leiðsla(lok)**

Arbeiðsorkan til leiðslu verður ásett av leiðara útbúgvingarstovnsins. Starvið kann røkjast av lærara, ið tá hevur undirvísingarskyldu. Verður lærari settur sum umsitingarleiðari fær hann eina viðbót á 7 % av lønini hjá cand.mag. á 8. stigi.

Viðm. Viðbótin er eftirlønargevandi frá 1. august 2017.

**10. Deildarleiðsla(lok):**

Leiðslutíðin verður avtalað lokalt í hvørjum einstøkum føri.

**11. Tóluppseting:**
Fyri at undirvísa í hesum lærugreinum á niðanfyrinevndu stigum, verður veitt eitt tímaískoyti fyri hvørt skúlaár fyri hvøn flokk/bólk:
Leiklist,visuel marknaðarførsla, myndlist, miðlakunnleika og tónleik (øll á C-stigi): 20 tímar
Alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði (øll frá 0 til C-stig): 30 tímar
Tilfeingisfrøði, B-stig: 42,5 tímar
Alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði (øll frá C til B-stig): 55 tímar

Alisfrøði, evnafrøði og lívfrøði (øll frá B til A-stig): 85 tímar
Um undirvísingargongdin er 0-A, el 0-B, so verða tímarnir býttir javnt millum árini.

**12. Próvtøkuviðurskifti**

a) **Munnlig próvtøka:** Hvør flokkur/bólkur, sum skal til próvtøku, útloysir ein grundtakst = 9,5 tímar til bæði lærara og próvdómara. Er talan bert um 1 næming, er grundtaksturin tó bert 5 tímar bæði til lærara og próvdómara. Umframt grundtakstin fáa bæði lærari og próvdómari fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku/ársroynd, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini.Dømi: um t.d. 24 næmingar eru uppi í lærugrein har próvtøkutíðin er 30 min. (0,5 t) so fáa bæði lærari og próvdómari: 9,5 tímar + 2 × 0,5 × 24 = 33,5 tímar
b) **Munnligar ársroyndir og sjúkraroyndir:** sum munnlig próvtøka
c) **Vegleiðing av sjálvlesandi í sambandi við próvtøku:** sí § 37
**d) Fyrireiking av próvtøku hjá sjálvlesandi, umroynd v.m. :** sí § 38
e) **Próvdøming av sjálvlesandi, umroynd v.m. :** sí § 39
f) **Næmingar við øðrvísi pensa**: sí § 40grein
g) **Próvtøku-/ terminsroyndarvaktir** við skrivliga próvtøku:
h) Lærari fær ta tíð í ársverkið, hann hevur nýtir til vaktina.
i) **Kæruviðgerð**: Arbeiðið í samband við viðgerð av kærum telur við í arbeiðstíðina í mun til nýtta tíð.

**13. Lærarатoymi:**

1. flokkur 87 tímar, 2. flokkur 51 tímar og 3. flokkur 42 tímar.

**14. LR-fundir, fundir í samstarvsnevnd og karakterfundir:**

Luttøka í hesum fundum verður skrásett og roknað við í ársverkið.

**15. Pædagogikumkandidatar (sen):**

Fyri at vegleiða pædagogikumkandidat verða 32 tímar taldir við í ársverki fyri hvørja lærugrein. Eru fleiri vegleiðarar verður arbeiðstíðin býtt lutfalsliga millum vegleiðararnar.

**16. Aðrar lokalar uppgávur:**

Leiðslan og einstaki lærarin/álitisfólkið avtala í hvørjum einstøkum føri nýtta tíð ella samsýning fyri lokalar uppgávur, so sum:

Taka í móti vitjan av 9.-10. flokkum, lektiu-café, kvøldseta, mentor fyri nýggjan lærara, upptøkuroyndir, heimasíðuumsiting, próvhandan, innleiðsludagar, faldarar og ársrit, starvsstovuroyndir fyri hold størri enn 17, sjúkraundirvísing, venjingartímar til próvtøku í ítrótti, kór, ítróttardag, sjálvboðin ítróttur,tónleikur og trygdarumboð.

**17. Námsferðir og skeið:**

Tá ið lærari er á styttri skeiði, verður hvør dagur roknaður við tí tíð, sum skeiðið er, tó í mesta lagi 7,9 tímar.
Tá ið lærari er við næmingum á námsferð telur hvør dagur 7,9 tímar.

**18. Felagspulja**

Til aðrar uppgávur sum hoyra lærarayrkinum til, t.d. at fylgja við í pedagogisku, teoretisku og praktisku menningini innan viðkomandi undirvísingarøki o.l., verða settir 32,5 tímar um árið til hvønn lærara.

Til foreldrafundir verða settir 2,5 tímar og til íverksetan av nýggju breytaskipanini verða settir 25 tímar um árið í tíðarskeiðinum frá 1. august 2013 til 31. juli 2016 til hvønn lærara.

Fyri lærara, sum arbeiðir niðursetta tíð ella sum verður settur í starv ella fer úr starvi í einum skúlaári, verða tímarnir omanfyri lækkaðir lutfalsliga.

**19. Próvtøkuvaktir** við skrivliga próvtøku:
Lærari fær ta tíð, hann hevur nýtir til vaktina.

### §30 Næmingatøl

Næmingatøl vera gjørd upp 15. september og 1. februar og eftir hesar dagar liggur tímatalið fast.

### §31 Undirvísingaramboð

Tað er skylda skúlans, at tær læribøkur og tey undirvísingaramboð, sum brúkt skulu verða í undirvísingini, eru tøk hjá lærarunum. Læribøkurnar og læriamboðini eru ogn skúlans.

## 6. Kapittul, samsýningar

### §32 Samsýningargjøld fyri tímalønt arbeiði, YF1 - YF6

**YF-satsur 1**

Tímasatsurin YF-1 verður defineraður sum 0,8% av nettománaðarlønini á stigi 4 í kandidatlønartalvuni. Frítíðarløn verður goldin av hesum tímasatsi til lærarar, sum eru settir eftir hesum sáttmála (smb. § 11 stk. 3). Tímar upp í fulla tíð eisini eftirlønargjald.

(til arbeiði, sum verður gjørt upp í klokkutímum) ein arbeiðstími (60 minuttir) verður løntur við:

**YF-satsur 2 = YF1 x (60+40)/60 = 5/3 x YF1**
(eksaminatión av sjálvlesandi, eksaminatión við studentspróvtøku undir serligum treytum, endurpróvtøkur):

**YF-satsur 3 = YF2 x 0,8**
(próvdøming munnlig og skrivlig, har løn verður veitt): YF2 * 80%

**YF-satsur 4= YF1 x 2**
(lesiringar, skeið fyri miðnámsnæmingar): Ein arbeiðstími + 60 min. fyrireiking = YF1 * 2

**YF-satsur 5 = YF1 x 2,5**
(undirvísing á hægri skúlum, t.d. á Fróðskaparsetrinum, skeið fyri lærarar). Ein arbeiðstími + 90 min. Fyrireiking.

**YF-satsur 6**
(vikartímar, eykatímar, sjúkraundirvísingartímar): Hesir tímar verða umroknaðir til klokkutímar soleiðis: 1 pultstími svarar til (1750/21,0)/12/4 = 1,736 klokkutímar. Hesir verða settir í bankan ella goldnir út eftir reglum í grein 25. Verða hesir tímar útgoldnir serstakt sum leysar lønir er upphæddin pr. tíma 1,157 % av netto mánaðarlønini.
Er talan um arbeiði uttan fyri breytaskipanina, eru satsirnir omanfyri at meta sum vegleiðandi.

**Ársverkstímasatsurin**
Frá 1. august 2016 at rokna verður ársverkstímasatsurin frá desember 2015 ikki longur brúktur. Ársverkstímasatsurin verður roknaður sum YF-6 býttur við 1,736. Frítíðarløn verður goldin og fyri tímar upp í fulla tíð eisini eftirlønargjald.

## §33 Nevndararbeiði

Nevndararbeiði undir MMR verður samsýnt eftir galdandi reglum landsstýrisins fyri fundarpening, er ikki annað avtalað.

## §34 Skemalegging

Fyri at leggja skema fær skemaleggjari eina samsýning, sum er: 20 % av YF1 fyri hvørja skemaeind.
Krevur rektarin eyka bindingar í tímatalvuna, verður innroknað ein skemaeind fyri hvørt eyka krav.

## §35 Verkætlanir og uppgávur

**1. Breytarverkætlan:**
Fyri at vegleiða og døma eina verkætlan fær lærari fyri hvørja uppgávu 0,15 tíma fyri hvønn tíma av útbúgvingartíð sum er sett av til verkætlanina. Eru tveir lærarar vegleiðarar verður tíðin hækkað við 50% og sum meginregla býtt javnt millum báðar.
Um útbúgvingartíðin er 50 tímar og tveir lærarar vegleiða og døma verkætlanina, fær hvør lærari: [0,15 × 50 × (1 + 0,5)]/2 = 5,625 tíma
Próvdómari: [0,15 × 50 (útbúgvingartíðina)] = 7,5 tíma
**2. Breytaruppgávan:**
*Vegleiðing og rætting:* [(0,15) x útbúgvingartíðina x (1 + ½)]/2 fyri hvønn lærara, um tveir vegleiða og rætta. (Uml. 1/3 av tíðini til vegleiðing og uml. 2/3 av tíðini til rætting).

Frá tann 1. august 2017 verður ásetingin soljóðandi
**1. Breytarverkætlan:**
Fyri at vegleiða og døma eina verkætlan fær lærari fyri hvørja uppgávu 0,15 tíma fyri hvønn tíma av útbúgvingartíð sum er sett av til verkætlanina. Eru tveir lærarar vegleiðarar verður tíðin hækkað við 50% og sum meginregla býtt javnt millum báðar.
Um útbúgvingartíðin er 50 tímar og tveir lærarar vegleiða og døma verkætlanina, fær hvør lærari og próvdómarin: [0,15 × 50 (útbúgvingartíðina)] = 7,5 tíma
**2. Breytaruppgávan:**
Vegleiðing og rætting: (0,15) x útbúgvingartíðina fyri hvønn lærara. Útbúgvingartíðin er vanliga 10 tímar. (Uml. 1/3 av tíðini til vegleiðing og uml. 2/3 av tíðini til rætting).

## §36 **Sjálvlesandi, stakgreinalesandi [eg havi lagt afturat yvirskiftini, BM]**

Vanlig lesandi og sjálvlesandi hava stórt sæð sama próvtøkugrundarlag, men munur er á, um tey fara upp saman við einum flokki/valholdi ella um tey fara upp sum "leysgangarar" (ikki saman við øðrum).

**Upp saman við einum flokki/valholdi**: Fyri vegleiðing: 3 tímar pr. næming. Fyri próvdøming: Lærari og próvdómari fáa fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini.

**Upp sum leysgangari:**

Fyri vegleiðing: 3 tímar pr. næming. Fyri fyrireiking: ein grundtakst = 9,5 tímar til bæði lærara og próvdómara. Er talan bara um 1 næming, er grundtaksturin tó bert 5 tímar bæði til lærara og próvdómara. Fyri próvdøming: lærari og próvdómari fáa fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini.

**Stakgreinalesandi** (stóð ikki í gamla sáttmálanum)Hesi eru vanliga partur av einum flokki og nýta sama próvtøkugrundarlag sum flokkurin.

**Upp saman við einum flokki/bólki:** Munnlig próvtøka: lærari og próvdómari fáa fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini

**Upp sum leysgangari:** Munnlig próvtøka: Fyri fyrireiking: ein grundtakst = 9,5 tímar til bæði lærara og próvdómara. Er talan bert um 1 næming, er grundtaksturin tó bert 5 tímar bæði til lærara og próvdómara. Fyri próvdøming: lærari og próvdómari fáa fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini.

**Øðrvísi undirvísingarfrágreiðing**

**Fyri at fyrireika próvtøku:** 2,5 tímar fyri hvørja ymiska undirvísingarfrágreiðing. Munnlig próvtøka: Lærari og próvdómari fáa fyri hvønn næming, sum hevur verið til próvtøku, 2 ferðir próvtøkutíðina, sum hon er ásett í námsætlanini, um flokkurin hevur verið uppi.

**Næmingar til endurprótøku** (hesir eru at meta sum sjálvlesandi, sí omanfyri)

**Vikartímar, eykatímar, sjúkraundirvísingartímar**

1 pultstími svarar til (1750/21,0)/12/4 = 1,736 klokkutímar. Hesir verða settir í tímabankan ella goldnir út sum leysar lønir eftir satsinum YF-6. Frítíðarløn verður roknað og fyri tímar upp í fulla tíð eisini eftirlønargjald.

Fyri at gera próvtøkuspurning við ókendum tilfari verður veittur 1 tími eyka. Endurnýtsla av sama ókenda tilfari við somu ella seinni próvtøku verður ikki samsýnt.

Skuldi próvtøka ligið leygardag, sunnudag, halgidagar ella aðrar almennar frídagar (tó ikki 5. juni), skal rindast 100% eyka.

**Lesiringar og skeið fyri næmingar.** Fyri hvønn klokkutíma verður latið 1,33 tími til fyrireiking.

**Undirvísing á Fróðskaparsetri og  skeið fyri lærarar**. Fyri hvønn klokkutíma verður latið 1,5 tími til fyrireiking.

## §37 Næmingar við øðrvísi pensum enn flokkurin/valbólkurin

Fyri at samskipa pensa fær lærarin 2,5***YF1** fyri hvønn næmingin.

## §38 At býta bólkar og flokkar

Tá ið tað í einum flokki ella bólki eru fleiri enn 17 næmingar, er loyvt at býta í 2, tá ið royndir/ venjingar verða gjørdar í alisfrøði, evnafrøði, lívfrøði og alis/evnafrøði. Samsýnt verður eftir rokn-ing, og samsýningin er 1 vikartími fyri hvønn býttan tíma, tó ikki meir enn 12 tímar um árið fyri bólkin.

## §39 At rætta skrivligar próvtøkuuppgávur

Sí uppískoyti E

## §40 Starvsstovuskeið

Lærari, ið skipar fyri starvsstovuskeiði, fær tímaløn YF-1 eftir rokning fyri at skipa fyri skeiðnum. Tíðin, hann er í royndarstovuni við næmingum, verður lønt við 2,66 x YF-1. Fyri at rætta skrivligu avrikini verður avtalað eitt tímatal, sum verður lønt við 1,4 x YF-1.

### §41 Uppgávunevndir

Fyri arbeiði í uppgávunevndum eru avtalaðar hesar samsýningar :

| | | 1.10.15 | 1.10.16 |
|---|---|---|---|
| Altjóða búskapur A | á búskaparbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Enskt A | á øllum breytum (tó ikki fyrireikingarbreytini) | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Enskt B | á øllum breytum | 12.720,92 | 12.962,62 |
| Føroyskt A | á øllum breytum | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Lívfrøði A | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á tøknibreytini, á tilfeingisbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Samfelagsfrøði A | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á tøknibreytini, á búskaparbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Sølubúskapur A | á búskaparbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Sølubúskapur B | á búskaparbreytini og møguliga á aðrari breyt | 12.720,92 | 12.962,62 |
| Støddfrøði C | á øllum breytum | 6.186,13 | 6.303,66 |
| Virkisbúskapur A | á búskaparbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |
| Virkisbúskapur B | á búskaparbreytini og møguliga á aðrari breyt | 12.720,92 | 12.962,62 |
| Danskt A | Á búskaparbreytini, og fyrireikingarbreytini | 15.465,31 | 15.759,15 |

Er ikki annað avtalað, verður peningurin býttur millum limirnar, soleiðis at formaðurin fær 10% meiri enn hini í nevndini.

Viðm.
Tann 1. janur 2017 kemur í gildi nýggj áseting um uppgávunevndir:
Samsýningarnar verða soleiðis: Uppgávusett til A-stig: 35.000 kr.
Uppgávusett til B-stig: 30.000 kr.
Uppgávusett til C-stig: 25.000 kr.Tillagað sett ("speglsett") verða samsýnt við 30 % av upprunasettinum.
Formaðurin fær 20% meir enn hini.

## 7. Kapittul, uppsøgn

### §42 Seravtalur

I sáttmálatíðini skal tað vera møguligt at gera seravtalur ímillum Fíggjarmálaráðið og og Yrkisfelagið Miðnám.
**2.** So hvørt sum reglugerðir verða gjørdar, kunnu samráðingar vera um tíðarnýtslu og samsýningar v.m., herundir broyting av galdandi reglum. Avtalur, ið verða gjørdar í sáttmálatíðini, skulu galda frá hálvársbyrjan í tí hálvárinum, avtalan er gjørd.

## §43 At siga sáttmálan upp

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. august 2015 og báðir partar kunnu siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi at fara úr gildi tann 1. oktober 2017.

**Stk. 2 Fylgibólkur**

Í sáttmálaskeiðnum situr fylgibólkur, við tveimum umboðum fyri hvønn partin. Partarnir eru samdir um, at tá ið nýggja arbeiðstíðarskipanin er sett í verk, eftirmeta teir hana í seinasta lagi eftir einum ári, tvs. á heysti í 2014, soleiðis at møguligar tillagingar kunnu gerast eftirfylgjandi skúlaár. Um álvarsligir trupulleikar skuldu stungið seg upp áðrenn hetta, hava báðir partar rætt til at kalla fylgibólkin saman at viðgera støðuna.

Argir 9.mai 2017

Yrkisfelag Miðnám Fíggjarmálaráðið

**Avtala um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.**

Tað er týðandi, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit til sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru samdir um at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna starvspolitikk á hesum økjum :

Førleikamenning
Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum
Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum
Javnstøða

Víst verður til hjáløgdu avtalu um tiltøk, ið stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á hesum øki.

# Uppískoyti A, løn

**Yrkisfelagið Miðnám** **Lønartalva 1. oktober 2015**

| Kandidatar Stig | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 |
|---|---|---|---|
| 1 | 29.669,01 | 4.450,35 | 343,27 |
| 2 | 30.344,04 | 4.551,61 | 351,08 |
| 3 | 31.034,42 | 4.655,16 | 359,07 |
| 4 | 31.740,51 | 4.761,08 | 367,24 |
| 5 | 32.462,67 | 4.869,40 | 375,59 |
| 6 | 33.201,25 | 4.980,19 | 384,14 |
| 7 | 33.956,63 | 5.093,49 | 392,88 |
| 8 | 34.729,20 | 5.209,38 | 401,82 |
| 9 | 35.519,36 | 5.327,90 | 410,96 |
| 10 | 36.327,48 | 5.449,12 | 420,31 |
| 11 | 37.154,00 | 5.573,10 | 429,87 |
| 12 | 37.999,31 | 5.699,90 | 439,65 |
| 13 | 38.863,87 | 5.829,58 | 449,65 |

Breytaverkætlanin:

| | |
|---|---|
| Lærarin | 1.904,03 |
| Próvdómarin | 1.904,03 |

| Cand. philar | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 |
|---|---|---|---|
| 1 | 28.007,20 | 4.201,08 | 324,04 |
| 2 | 28.614,02 | 4.292,10 | 331,06 |
| 3 | 29.234,00 | 4.385,10 | 338,24 |
| 4 | 29.867,42 | 4.480,11 | 345,57 |
| 5 | 30.514,55 | 4.577,18 | 353,05 |
| 6 | 31.175,71 | 4.676,36 | 360,70 |
| 7 | 31.851,19 | 4.777,68 | 368,52 |
| 8 | 32.541,31 | 4.881,20 | 376,50 |
| 9 | 33.246,37 | 4.986,96 | 384,66 |
| 10 | 33.966,72 | 5.095,01 | 392,99 |
| 11 | 34.702,68 | 5.205,40 | 401,51 |
| 12 | 35.454,58 | 5.318,19 | 410,21 |
| 13 | 36.222,78 | 5.433,42 | 419,10 |

| | |
|---|---|
| YF1 | 253,87 |
| YF2 | 423,12 |
| YF3 | 338,50 |
| YF4 | 507,74 |
| YF5 | 634,68 |
| YF6 | variabul |

| Bache-lorar | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 |
|---|---|---|---|
| 1 | 24.765,58 | 3.714,84 | 286,54 |
| 2 | 25.349,05 | 3.802,36 | 293,29 |
| 3 | 25.946,52 | 3.891,98 | 300,20 |
| 4 | 26.558,33 | 3.983,75 | 307,28 |
| 5 | 27.184,84 | 4.077,73 | 314,53 |
| 6 | 27.826,36 | 4.173,95 | 321,95 |
| 7 | 28.483,28 | 4.272,49 | 329,55 |
| 8 | 29.155,97 | 4.373,40 | 337,33 |
| 9 | 29.844,82 | 4.476,72 | 345,30 |
| **10** | 30.550,19 | 4.582,53 | 353,47 |
| 11 | 31.272,49 | 4.690,87 | 361,82 |
| 12 | 32.012,11 | 4.801,82 | 370,38 |
| **13** | 32.769,50 | 4.915,43 | 379,14 |
| 14 | 33.541,25 | 5.031,19 | 388,07 |
| 15 | 34.316,13 | 5.147,42 | 397,04 |

**Hægri undirvísing 1, íroknað fyrireiking (merkonom o.l.):**
YF4 507,74

**Hægri undirvísing 2, íroknað fyrireiking (HD):**
YF5 634,68

**Vegleiðing hægri útbúgving:**
YF1 253,87

| Tímalærari | | |
|---|---|---|
| B | 23.527,30 | 3.529,10 |

**Yrkisfelagið Miðnám Lønartalva 1. oktober 2016**

| Kandidatar Stig | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 30.232,72 | 4.534,91 | 349,79 | Breytaverkætlanin: | |
| 2 | 30.920,58 | 4.638,09 | 357,75 | Lærarin | 1.940,18 |
| 3 | 31.624,07 | 4.743,61 | 365,89 | Próvdómarin | 1.940,18 |
| 4 | 32.343,58 | 4.851,54 | 374,22 | | |
| 5 | 33.079,46 | 4.961,92 | 382,73 | | |
| 6 | 33.832,07 | 5.074,81 | 391,44 | | |
| 7 | 34.601,81 | 5.190,27 | 400,34 | | |
| 8 | 35.389,05 | 5.308,36 | 409,45 | | |
| 9 | 36.194,23 | 5.429,13 | 418,77 | | |
| 10 | 37.017,70 | 5.552,66 | 428,29 | | |
| 11 | 37.859,93 | 5.678,99 | 438,04 | | |
| 12 | 38.721,30 | 5.808,20 | 448,01 | | |
| 13 | 39.602,28 | 5.940,34 | 458,20 | | |

| Cand. philar | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 28.539,34 | 4.280,90 | 330,20 | | |
| 2 | 29.157,69 | 4.373,65 | 337,35 | | |
| 3 | 29.789,45 | 4.468,42 | 344,66 | | |
| 4 | 30.434,90 | 4.565,24 | 352,13 | YF1 | 258,69 |
| 5 | 31.094,33 | 4.664,15 | 359,76 | YF2 | 431,15 |
| 6 | 31.768,05 | 4.765,21 | 367,56 | YF3 | 344,92 |
| 7 | 32.456,36 | 4.868,45 | 375,52 | YF4 | 517,38 |
| 8 | 33.159,59 | 4.973,94 | 383,66 | YF5 | 646,73 |
| 9 | 33.878,05 | 5.081,71 | 391,97 | YF6 | variabul |
| 10 | 34.612,09 | 5.191,81 | 400,46 | | |
| 11 | 35.362,03 | 5.304,30 | 409,14 | | |
| 12 | 36.128,22 | 5.419,23 | 418,00 | | |
| 13 | 36.911,01 | 5.536,65 | 427,06 | | |

| Bache-lorar | Mánaðarløn netto | Eftirlønargjald 15,0% | YF6 | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 25.236,13 | 3.785,42 | 291,98 | | |
| 2 | 25.830,68 | 3.874,60 | 298,86 | **Hægri undirvísing 1,** | |
| 3 | 26.439,50 | 3.965,93 | 305,91 | **íroknað fyrireiking** | |
| 4 | 27.062,94 | 4.059,44 | 313,12 | **(merkonom o.l.):** | |
| 5 | 27.701,35 | 4.155,20 | 320,50 | YF4 | 517,38 |
| 6 | 28.355,06 | 4.253,26 | 328,07 | | |
| 7 | 29.024,46 | 4.353,67 | 335,81 | **Hægri undirvísing 2,** | |
| 8 | 29.709,93 | 4.456,49 | 343,74 | **íroknað fyrireiking (HD):** | |
| 9 | 30.411,87 | 4.561,78 | 351,87 | YF5 | 646,73 |
| **10** | 31.130,64 | 4.669,60 | 360,18 | | |
| 11 | 31.866,67 | 4.780,00 | 368,70 | **Vegleiðing** | |
| 12 | 32.620,34 | 4.893,05 | 377,42 | **hægri útbúgving:** | |
| **13** | 33.392,12 | 5.008,82 | 386,35 | YF1 | 258,69 |
| 14 | 34.178,53 | 5.126,78 | 395,45 | | |
| 15 | 34.968,14 | 5.245,22 | 404,58 | | |

| | | |
|---|---|---|
| Tímalærari B | 23.974,32 | 3.596,15 |

## Uppískoyti B, limir í serligum størvum

Sambært §2, 4. petti eru avtalaðar hesar viðbøtur:
1) Umsitingarleiðarin, sum er varamaður rektarans, fær eina mánaðarliga viðbót, sum er 13% av mánaðarlønini hjá cand.mag. á 8. stigi.
2) Námsráðgevin í føroyskum fær eina mánaðarliga viðbót, sum er 9,5% av mánaðarlønini hjá cand.mag. á 8. stigi.
3) Ritstjórar á Nám fáa eina mánaðarliga viðbót, sum er 2,75% av mánaðarlønini hjá cand. mag. á 8. stigi. Arbeiðstíðin á KT-deplinum verður gjørd upp í klokkutímum.
4) Deildarleiðari fær, fyri at útinna ymsar leiðsluuppgávur, eina mánaðarliga viðbót, sum er 13% av mánaðarlønini hjá cand. mag. á 8. stigi.

(Nevndu viðbøtur eru eftirlønargevandi frá 1. august 2017)

### Uppískoyti C, protokollat

**Protokollat 1**
**Telduvegleiðarar, verða løntir soleiðis: [**0.12 x lærаratalið + 0,042 x næmingatalið] x 0,474 x 83,3 klokkutímar.
**Protokollat 2**
**Føroyskt undirvísingartilfar**
Lærugreinirnar samfelagsfrøði, lívfrøði, fiskivinna, landalæra, søga og føroyskt fáa 33 tíma/lærar/lærugrein/flokk í í sambandi við, at føroyskt undirvísingartilfar verður framleitt. (Parallelflokkar verða tó roknaðir sum ein flokkur) . Lærari, ið ger krav á hesa samsýning, letur primo apríl inn tað tilfar, ið hon/hann metir kemur undir hesa avtalu, til leiðslu skúlans. Tilfarið skal vera býtt sundur flokk fyri flokk.

**Protokollat 3**
**Bókasavn,** víst verður til §30
**Protokollat 4**
**Ársverksskipan. Avtikið**
**Ískoyti til *Protokollat 4, Ársverksskipan:*** víst verður til hendan sáttmála
**Ársverksskipan, Avtikið**

**Protokollat 5**
**Næmingatal.**
Næmingatalið í einum studentaskúla- og HF-flokki eigur vanliga ikki at fara upp um 24. Í sambandi við upptøku í 1.flokk kann tó verða farið upp í 26. Flokkar verða ikki lagdir saman uttan so, at næmingatalið í samanlagda flokkinum fer niður um 24.

Protokollatið er bert galdandi á fyrireikingarbreytini, hugbreytini, náttúrubreytini og tilfeingisbreytini.

## Uppískoyti D

**REGLUGERÐ fyri álitisfólk**

**§ 1.** Til álitisfólk og varaálitisfólk kunnu veljast limir í YF í føstum starvi, sum hava sítt høvuðsstarvsstað á staðnum, tey eru vald, og sum hava verið í starvi í minst eitt ár.

Valið fer fram í mars/apríl mánaði í sambandi við LR-aðalfundin.

Valskeiðið er tvey ár.

Landið er skipað í álitisfólkaøki soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| Øki A: | HF – Klaksvík | 1 álitisfólk |
| | Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 1 álitisfólk |
| | Føroya handilsskúli á Kambsdali | 1 álitisfólk |
| Øki B: | Fiskivinnuskúlin í Vestmanna | 1 álitisfólk |
| | Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 2 álitisfólk |
| | Miðnámsskúlin í Suðuroy | 1 álitisfólk |
| | Nám (áður Føroya Skúlabókagrunnur) | 1 álitisfólk |
| | Føroya Handilsskúli í Havn | 1 álitisfólk |

Valreglur:

Á hvørjum skúla verða vald minst eitt álitisfólk og eitt varaálitisfólk við vanligum meiriluta av møttum limum (t.v.s. vanligum limum sambært § 2 í lógum felagsins).

Stýrislimir kunnu ikki eisini vera álitisfólk.

Á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoy verða eitt álitisfólk og eitt varaálitisfólk vald stak ár.

Á HF-skeiðinum í Klaksvík verður eitt álitisfólk valt maka ár.

Á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna verður eitt álitisfólk valt stak ár.

Á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði verða eitt álitisfólk og eitt varaálitisfólk vald stak ár og eitt álitisfólk valt maka ár.

Á Miðnámsskúlanum í Suðuroy verður eitt álitisfólk valt maka ár.

Á Føroya Skúlabókagrunni verður eitt álitisfólk valt stak ár.

Á Føroya handilsskúli á Kambsdali verður álitisfólk valt maka ár

Á Føroya handilsskúla í Havn verður álitisfólk valt stak ár.

Valið hevur gildið, tá ið YF hevur góðkent tað, og skrivliga hevur boðað frá skúlans/stovnsins leiðslu frá valinum. Henda fráboðan eigur at verða gjørd í seinasta lagi 14 dagar eftir valið.

**§ 2.** YF kunnar um lógir, sáttmálar og aðrar avtalur. Álitisfólkið heldur eyga við, at tær verða yvirhildnar. Álitisfólkið, ið er talsmaður limanna, hevur saman við leiðsluni ábyrgd av, at limirnir verða kunnaðir og tiknir við í ráðum um mál, ið viðvíkja arbeiðsplássinum.

Álitisfólkið skal eins og leiðslan syrgja fyri best møguligum samstarvi og góðum arbeiðsviðurskiftum.

Álitisfólkið hevur tagnarskyldu.

**§ 3.** Álitisfólkið hevur rætt og skyldu til at leggja fyri skúlans leiðslu uppskot, áheitanir og klagur frá limum, og kann taka upp samráðingar við leiðslu skúlans um innanhýsis viðurskifti.

Álitisfólkið skal vera ráðgevandi fyri leiðslu og limir um arbeiðsviðurskifti, rættindi og skyldur.

Álitisfólkið hevur skyldu at kunna limirnar í økinum og YF um øll viðkomandi viðurskifti.

**§ 4.** Tá ið lærari verður sagdur úr starvi ella fær boð um at flyta skúla, kann álitisfólkið leggja málið fyri YF.

**§ 5.** Álitisfólkið hevur rætt til farloyvi  við løn tveir dagar um árið til skeið, fundir ella annað yrkisfelagsvirksemi.

Tá ið YF søkir um farloyvi fyri álitisfólk til skeið og fundir, eigur skúlin at viðgera slíkar umsóknir við vælvild.

**§ 6.** Verður álitisfólk sagt úr starvi, skal uppsøgnin viðgerast millum YF og Fíggjarmálaráðið. Við uppsøgnini skal fylgja holl skrivlig grundgeving fyri uppsøgnina. Henda grundgeving verður grundarlagið undir fundinum millum YF og Fíggjarmálaráðið.

**§ 7.** YF hevur skyldu til at hava eina dagførda álitisfólkahandbók við øllum neyðugum reglum, sum eru galdandi fyri lærarar, og senda álitisfólkunum tilfar, so hvørt reglurnar broytast.

Álitisfólkið hevur skyldu at ansa eftir, at álitisfólkahondbókin altíð er tøk í skúlanum,

YF skal javnan halda útbúgvingarskeið fyri álitisfólkunum.

## Uppískoyti E

# Students- og HF-próvtøkan

## Næmingaavrik at rætta um tíman til skrivliga próvtøku

| Lærugrein | Student | | HF | |
|---|---|---|---|---|
| | kravt stig | hástig | felagslærugrein | vallærugrein |
| Alisfrøði | | 2,5 | | |
| Danskt | 2 | | 2 | |
| Enskt | 2 | 1,5 | 2 | |
| Evnafrøði | | 2,5 | | |
| Franskt, byrjanarmál | | 2 | 2 | |
| Føroyskt | 2 | | 2 | |
| Griskt | | 2 | | |
| Latín | | 2 | | |
| Lívfrøði | | 2 | | |
| Russiskt | | 2 | | |
| Samfelagsfrøði | | 2 | | |
| Spanskt | | 2 | | |
| Støddfrøði | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 |
| Tónleikur | | 2 | | |
| Týskt, byrjanarmál | | 2 | | |
| Týskt, framhaldsmál | | 1,5 | | 2 |

# FHS og HH-próvtøkan

## Næmingaavrik at rætta um tíman til skrivliga próvtøku

| Lærugrein | 2. HH | 1. HH | FHS |
|---|---|---|---|
| | skrivligt | skrivligt | skrivligt |
| Altjóða búskapur A | 2 | | |
| Altjóða búskapur B | | | |
| Ársroknskapur A | 3 | | |
| Danskt A | 2 | | |
| Dekoratión C | | | |
| Enskt A | 2 | | |
| Enskt B | 2 | 2 | |
| Enskt C | | | 3 |
| Fiskivinna B | 2 | 2 | |
| Fjølmiðlakunnleiki C | | | |
| Formlist C | | | |
| Franskt E | | | |
| Fyriskipan A | 3 | | |
| Føroyskt A | 2 | | |
| Føroyskt C | | | 3 |
| Heimspeki C | | | |
| Inovatión | | | |
| Kunningartøkni A | | | |
| Kunningartøkni B | | | |
| Kunningartøkni C | | | 2 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Marknaðarførsla A | 2,5 | | |
| Marknaðarførsla C | | | |
| Mentanarfatan C | | | |
| Sálarfrøði C | | | |
| Samfelagslæra/fiskivinna C | | | |
| Samtíðarsøga B | | | |
| Samtíðarsøga C | | | |
| Spanskt E | | | |
| Støddfrøði A | 2 | | |
| Støddfrøði B | 2,5 | 2,5 | |
| Støddfrøði C | | 2,5 | 2,5 |
| Støddfrøði D | | | 4 |
| Sølubúskapur A | 2,5 | | |
| Sølubúskapur B | | 2,5 | |
| Týskt A | 2 | | |
| Týskt B | 2,5 | 2,5 | |
| Týskt C | | | |
| Týskt D | | | |
| Verkætlan (fast evnisskeið) | | | 1,5 t/v |
| Vinnulívsrættur C | | | |
| Virkisbúskapur A | 3 | | |
| Virkisbúskapur B | | 3 | |
| Virkisbúskapur C | | | 3 |

| Skrivligar próvtøkuuppgávur í breytaskipanini. | | |
|---|---|---|
| | Næmingaavrik at rætta um tíman til skrivliga próvtøku | **Uppgávur um tíman** |
| Alisfrøði A ná | á náttúrubreytini | 2,5 |
| Alisfrøði A tø | á tøknibreytini (eitt kt-gundað uppgávusett) | 2,0 |
| Altjóða búskapur A | á búskaparbreytini | 2,0 |
| Danskt A | á øllum breytum | 2,0 |
| Enskt A | á øllum breytum (tó ikki fyrireikingarbreytini) | 1,5 |
| Enskt B | á øllum breytum | 2,0 |
| Evnafrøði A | á náttúrubreytini, á tøknibreytini | 2,5 |
| Føroyskt A | á øllum breytum | 2,0 |
| Franskt byrj. A | á hugbreytini, á búskaparbreytini | 2,0 |
| Lívfrøði A | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á tøknibreytini, á tilfeingisbreytini | 2,0 |
| Samfelagsfrøði A | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á tøknibreytini, á búskaparbreytini | 2,0 |
| Sølubúskapur A | á búskaparbreytini | 2,5 |
| Sølubúskapur B | á búskaparbreytini og møguliga á aðrari breyt | 2,5 |
| Spanskt byrj. A | á hugbreytini, á búskaparbreytini | 2,0 |
| Støddfrøði C | á øllum breytum | 2,5 |
| Støddfrøði B bú | á búskaparbreytini | 2,5 |
| Støddfrøði B hu, ná, fy | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á fyrireikingarbreytini | 2,5 |
| Støddfrøði B tø, ti | á tøknibreytini, á tilfeingisbreytini | 2,5 |
| Støddfrøði A ná | á náttúrubreytini | 2,5 |
| Støddfrøði A tø, ti | á tøknibreytini, á tilfeingisbreytini | 2,5 |
| Støddfrøði A bú | á búskaparbreytini | 2,0 |
| Tónleikur A | á hugbreytini, á náttúrubreytini, á búskaparbreytini | 2,0 |
| Týskt framh. A | á hugbreytini, á búskaparbreytini | 1,5 |

| | | |
|---|---|---|
| Týskt byrj. A | á hugbreytini, á búskaparbreytini | 2,0 |
| Virkisbúskapur A | á búskaparbreytini | 3,0 |
| Virkisbúskapur B | á búskaparbreytini og møguliga á aðrari breyt | 3,0 |
| **Skrivligar próvtøkuuppgávur í yrkisútbúgvingunum** | | |
| Føroyskt C | | 3,0 |
| Enskt C | | 3,0 |
| Virkisbúskap C | | 3,0 |
| Støddfrøði D | | 4,0 |